Brimil:

# Gev manningini eyka løn fyri hvønn fiskitjóv, teir taka

**– Ein máti at loysa ósemjuna um lønina á manningini á Brimli, er at gera eina bonusskipan, so at teir fáa eykaløn, hvørja ferð teir taka ein fiskitjóv, heldur formaðurin í útróðrarfelagnum á Eiði**

BRIMIL
*Áki Bertholdsen*

Tað hava nógv uppskot verið frammi ímillum ár og dag um, hvussu ósemjan um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli, skal loysast.

Men Finnur Egholm, útróðrarmaður og formaður í útróðrarfelagnum á Eiði, hevur eitt uppskot, sum ongantíð hevur veirð frammi, men sum hann heldur, hevði verið eitt gott hugskot.

Hann skjýtur upp, at ein partur av lønini hjá manningini á Brimli skuldi verið, at teir fingu eina ávísa upphædd í eykaløn fyri hvønn fiskitjóv, sum teir tóku.

Hann heldur, at hetta hevði óivað eggjað manningini til at gjørt eyka nógv burturúr vaktarhaldinum undir Føroyum.

Hann heldur eisini, at teir, sum vera tiknir fyri at fiska ólógliga, eiga at fáa nógv størri bót, enn teir fáa í dag, og endurtekur brotið seg, eiga teir at missa fiskiloyvi.

– Bøturnar eiga at verða so stórar, at teir næstan fíggjar virksemið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuna, heldur Finnur Egholm.

Eftir hansara tykki er tað harðliga tiltrongt at taka óvanlig stig fyri at koma ránsveiðini til lívs.

Tað gongur sjón fyri søgn, at nógv verður fiskað ólogligt, ikki minst, nú vaktarhaldið undir Føroyum er so nógv skert.

Hann sigur, at tað er bara at hyggja eftir øllum toskinum, sum bátarnir fáa.

– Allan handan toskin fáa teir ikki, uttan at teir fara inn á stongdar leiðir, er útróðrarmaðurin á Eiði fullvísur í.

– Toskurin er so nógv minkaður seinasta árið, at tað letur seg ikki gera at fáa so nógvan tosk, ið summir fáa, uttan at fiska innanfyri.

Ikki minst er toskurin á Føroya Banka at kalla horvin. Hann vísur m.a. á, at í 1999 fiskaðu teir tosk fyri 900.000 krónur í 47 dagar, men í fjør fiskaðu teir bara fyri 300.000 krónur á Føroya Banka. Hann veit eisini um ein bát, sum bara fekk ein einsamallan tosk á Føroya Banka. Hansara áheitan er tí, at alt tað grunna á Føroya Banki verður fullkomiliga friðað.

Men hann undrast ikki á at tað stendur so illa til, tí tað verður nógv fiskað ólógligt.

Hann veit um dømi, har teir hava ligið og sovið umborð á einum snellubáti, men eru vaknaðir við buldur og brak, tá ið ein trolari er komin togandi framvið - beint ígjøgnum Føroya Banka.

Hann heldur eisini, at tað er neyðugt at fara harðari fram ímóti teimum, sum fiska ólóligt, tí tað eru nakrir fáir, sum gera tað og teir oyðileggja fiskiskapin fyri allar teir, sum halda seg til lógir og reglar.

Hann heldur eisini, at vit nú mugu gera álvara av at hava fylgissveinaeftirlit við føroyskum skipum, tí so veit Vaktar- og Bjargingartænastan altíð, akkurát, hvar hvørt skipið er. Hann heldur, at hetta kundi í fyrstu atløgu verið roynt umborð á útvaldum skipabólkum.

# Fáa nú alt undir sama tak

**Hvalbiar Kommuna hevur nú keypt eini stór hús mitt í bygdini. Har er pláss fyri allari umsiting og allari útgerð hjá kommununi**

HÚSAKEYP
*Áki Bertholdsen*



*Hetta er nýggja ráðhúsið í Hvalba. Kommunan hevur keypt hetta húsið, sum nú skal hýsa øllum virkseminum hjá kommununi*

Hvalbiar Kommuna hevur nú keypt eini stór sethús, sum ætlanin er at hava ymiskt kommunalt virksemi í.

Talan er um húsini hjá Poul Nónfjall, vanliga nevndur Poul í Fámjin, sum kommunan nú hevur keypt.

Húsini liggja sera væl fyri, mitt í bygdini og tað er frítt rundanum tey, so møguleikarnir at sleppa til og frá eru sera góðir. Hartil eru húsini stór, tríggjar hæddir, har alt er innrættað og uttanfyri er hampiliga stórur bilskúrur

Húsini kostaðu 500.000 krónur at keypa.

## Alt kommunalt virksemi

Levi Niclasen, bygdaráðsformaður í Hvalba, sigur, at ætlanin er at nú skal alt kommunalt tað virksemið húsast undir sama taki í nýggja húsinum.

Eitt nú skal kommunuskrivstovan flyta yvir í húsið. Somuleiðis er ætlanin at sløkkiliðsúterðin skal vera í kjallaranum og har er eisini pláss fyri gravkúgv og øðrum arbeiðsamboðum hjá kommununi.

Nýggja kommunulógin setir eisini størri krøv til kommunurnar, eitt nú skulu bygdaráðsfundirnir hereftir verða almennir. Í nýggja húsinum verður eisini pláss fyri at hava almennar bygdaráðsfundir.

At kommunan nú fær flutt alt sítt virksemi undir sama tak, er eitt stórt framstig, tí hølisumstøðurnar eru ógvuliga vánaligar, sum er. Einasta høli, ið kommunan hevur, er gamli skúlin, sum heimarøktin eisini brúkar. Og hann er so lítil, at tað er ikki hugsingur um at hava almennar fundir har. Nógv av amboðunum og útgerðini hjá kommununi standa eisini illa, sum er.

Nær kommunan flytir í nyggju húsini, er ikki greitt enn, tí okkurt smávegis er at gera við tey.

Av tí at kommunan ikki hevur umstøður at hava almennar fundir, sum er, hevur hon fingið eitt skotbrá til 1. juli at hava almennar fundir. Juli og august er summarfrí, so fyrsti almenni bygdaráðsfundur í Hvalba verður í september.

Enn er støða ikki tikin til, hvat Gamli Skúli, sum kommunan nú húsast í, skal brúkast til. Levi Niclasen sigur, at ein møguleiki er at Fornminnafelagið fær hann at húsast, men aðrir møguleikar eru eisini.

# Fara nú at gera gonguteigar í Vági

**Vágs Býráð hevur samtykt at gera nakrar gonguteigar um høvuðsvegin í Vági**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*



*Mikukvøldið helt Vágs Býráð sín fyrsta veruliga fund eftir valið seinast í November. Eitt tað fyrsta, nývalda býráðið gjørdi, var at samtykkja at gera nakrar gonguteigar tvørturum vegin fyri at bøta um ferðslutrygdina*

Vágs Kommuna fer nú nú at gera nakrar gonguteigar tvørtum um høvuðsvegin í Vági fyri at bøta um ferðslutrygdina.

Hetta varð samtykt á býráðsfundi í Vági mikukvøldið.

Samtykt er at gera fýra gonguteigar, og møguliga verður tann fimti eisini gjørdur.

Fyri at byrja í øðrum endanum, so er ætlanin at gera tann uttasta gonguteigin tvørtur um vegin við Suðuroyar Sparikassa.

Síðani skal ein gerast við Meinigheitshúsið, ein vesturi á Gørðunum og tann fjórði við Báruna.

Serliga tann vesturin á Gørðunum, hildu býráðslimir vera átrokandi, tí har gongur nógv fólk, og tá ið tað er myrkt í veðrinum, er sýnið ringt. Har á leiðini er eisini meir enn ein ferðsluvanlukka hend, sum hevur kravt mannalív.

Annars skal møguleikin eisini kannast at gera ein gonguteig tvørturum vegin vesturi við Vatnið, tí har gongur eisini rættiliga nógv fólk tvørturum vegin, ikki minst í samband við dystir í høllini og á vøllinum vesturi á Eiðinum, men eisini fólk í ganga túr í tí hugnaliga umhvørvinum har um leiðir.

Allir gonguteigarnir verða útgjørdir við ljósum, so at teir verða væl upplýstir.



# Umbyggja svimjihøllina



*Svimjihøllin í Klaksvík er niðurslitini, og tí er átrokandi neyðugt við umfatandi umvælingum.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Klaksvíkar kommuna ætlar at brúka 25 milliónir krónur til at gera niðurslitnu svimjihøllina í Klaksvík í stand**

UMBYGGING
*Eyðun Klakstein*

Um svimjihøllin í Klaksvík ikki verður gjørd í stand sum skjótast, má hon steingjast.

Tað hevur Klaksvíkar kommuna gjørt sær greitt, og tí hevur málið verið viðgjørt í umsitingini og hjá arkitekti seinastu tíðina.

## Broytingar í høllini

Svimjihøllini í Klaksvík hevur nógv ár á baki, og nú er hon í so ringum standi, at hon má steingja, um hon ikki verður sett í stand.

Í sambandi við umvælingarnar verða broytingar gjørdar í høllini.

Fimm metrar djúpi kavihylurin skal gerast til hyl við skreiðubreyt til børnini. Nýtt gosbað verður gjørt í høllini, og ætlanin er eisini at gera kaffistovu í høllini.

Týskvøldið var málið lagt fyri býráðið í Klaksvík at taka støðu til, og her var ein umfatandi umvælingarætlan fyri svimjihøllina samtykt.

Tað fer at kosta einar 25 milliónir krónur at gera svimjihøllina í stand, og hesar pengarnar ætlar Klaksvíkar kommuna at brúka komandi árini.

## Spurningur um pengar

Tá málið var fyri á býráðsfundinum týskvøldið, greiddi Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri frá, at allir pengarnir til umfatandi umbyggingina ikki vóru tøkir enn.

Hóast hetta samtykti býráðið at seta umvælingarætlanina í verk. Nakað av pengum er í einum grunni, sum er ætlaður til endamálið, men meiri skal játtast seinni.

Einki kjak var á býráðsfundinum um málið, men formaðurin í Umhvørvis- og menningarnevndini hjá Klaksvíkar býráði, Rani Nolsøe, bað borgarstjóran syrgja fyri, at umhvørvisatlit vóru tikin til umbyggingina, so svimjihøllin ikki leiðir nakað burtur í Ósánna, sum rennir nærindis.

Borgarstjórin í Klaksvík roknar við, at svimjihøllin er liðugt umbygd um ein tvey ár, men hetta veldst sjálvandi um viljan hjá býráðnum at játta pengar til endamálið.

# Havsbrún ger framtak í Hanstholm

**Havsbrún sleppir at seta tríggjar milliónir krónur í Hanstholm Fiskemelsfabrik, sum hevði hálvafimtu millión í halli farna roknskaparár**

HAVSBRÚN
*Eyðun Klakstein*

Havsbrún í Fuglafirði sleppur nú at seta tríggjar milliónir krónur í Hanstholm Fiskemelsfabrik.

Hetta gav aðalfundurin í danska felagnum loyvi til í vikuni.

Partapeningurin í felagnum er í løtuni seks milliónir krónur, men hann verður hækkaður upp í 9 milliónir, og tær tríggjar milliónirnar hevur Havsbrún rætt til at seta í felagið.

Harvið kemur føroyska felagið at eiga ein triðing í tí danska felagnum.

## Stórt hall

Hanstholm Fiskemelsfabrik er tann minsta av sínum slagi í Danmark. Í roknskaparárinum 1999/2000 tók virkið ímóti 108.462 tonsum av ídnaðarfiski.

1999/2000 var eitt vánaligt ár hjá felagnum, tí tað hevði hall upp á 1,1 millión krónur. Virkið fekk statsstuðul til orkunýtslu upp á næstan hálvafjórðu millión, og tí var hallið áðrenn óvanligar inntøkur 4,5 milliónir krónur.

Hetta kallaði nevndin eisini eitt »ikki nóg gott úrslit« á nevndarfundinum í vikuni.

## Venda gongdini

Havsbrún og Hanstholm Fiskemelsfabrik hava havt ávíst samstarv seinasta árið, og Havsbrún hevur víst áhuga fyri at koma upp í danska felagið.

– Nevndin heldur, at samstarvið við Havsbrún fer at styrkja málið um, at tað altíð skal verða eitt fiskamjølsvirki í Hanstholm, segði Henning Bjerregaard, nevndarformaður, á aðalfundinum.

Virkið í Hanstholm vónar, at samstarvið við Havsbrún kann tryggja rávøru og vinning í framtíðini.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,0 Gli** Skrás.: 02-04-98 Km.: 44.000 Prísur: 189.600,- Garanti** | **SSANGYONFG MUSSO 4X4** Skrás.: 18-12-97 Km.: 43.000 Prísur: 187.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK** Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 165.600,- Garanti* | **VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 06-99 |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 Gli** Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 69.600,- Sýnaður 10-00 | **PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL** Skrás.: 10-01-96 Km.: 80.000 Prísur: 128.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN** Skrás.: 24-08-95 Km.: 112.000 Prísur: 110.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 CDX** Skrás.: 18-10-96 Km.: 77.000 Prísur: 103.600,- Garanti* | **MAZDA 323 1,5 LX** Skrás.: 30-09-97 Km.: 99.000 Prísur: 80.600,- Garanti * |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* Sýnaður 03-00 | **HYUANDAI ACCENT 1,5** Skrás.: 02-01-98 Km.: 25.000 Prísur: 79.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 30-08-95 Km.: 151.000 Prísur: 100.600,- Garanti* Sýnaður 01-00 | **RENAULT MEGANE 1,6 3 HURÐ:.** Skrás.: 22-05-96 Km.: 100.000 Prísur: 65.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 28-10-93 Km.: 140.000 Prísur: 83.600,- Garanti * | **FORD ESCORT 1,6** Skrás.: 22-09-95 Km.: 87.000 Prísur: 74.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B** Skrás.: 11-08-98 Km.:17.000 Prísur: 132.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,6 5 HURÐAR** Skrás.: 06-06-95 Km.: 82.000 Prísur: 65.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,8 SPORT** Skrás.: 01-08-95 Km.: 43.000 Prísur: 74.600,- Sýnaður 12-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6** Skrás.: 19-11-98 Km.: 15.000 Prísur: 124.600,-Garanti** | **FORD FIESTA 1,8 DIESEL** Skrás.: 19-01-96 Km.: 97.000 Prísur: 63.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 114.600,- Garanti** | **CITROEN BX DIESEL** Skrás.: 01-11-88 Km.: Prísur: 29.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B** Skrás.: 16-10-97 Km.: 57.000 Prísur: 98.600,- Garanti* | **SUZUKI ALTO 1,0** Skrás.: 13-11-96 Km.: 43.000 Prísur: 60.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 AUT.GEAR** Skrás.: 22-06-97 Km.: 116.000 Prísur: 29.600,- Sýnaður 11-00 | **FORD ESCORT 1,8 DIESEL** Skrás.: 16-08-91 Km.: 134.000 Prísur: 42.600,- Sýnaður 01-01 |

Sosialurin - 311820

VØRUVOGNAR

| | |
|---|---|
| **MERCEDES BENZ VITO VAN** Skrás.: 23-06-98 Km.: 50.000 Prísur: 148.600,- Garanti* | **MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL** Skrás.: 11-05-00 Km.: 9.000 Prísur: 128.600,- Garanti* |

STØKKIÐ INN Á GÓLVIÐ

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

REYNI SERVICE




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040